# TB fingið flúgvandi byrjan

**Flogbóltur: Alt bendir á, at besta kvinnudeildin í vetur fer at snúgva seg um TB og so hini. Í øllum førum hava TB-kvinnurnar fingið best hugsandi byrjan uppá kappingina. Leygardagin vunnu tær 3-0 á Giljanesi móti føroyameistarunum Drátti**

*Emil Lisberg Jacobsen*

**Dráttur-TB 0-3 (11-25, 13-25, 23-25)**

Tað er eingin ivi um, at TB-kvinnurnar ætla sær okkurt stórt í ár. Tvey tey fyrstu umførini av landskappingini hava tær vunnið sannførandi á útivølli móti teimum báðum liðunum, ið endaðu ovast og næstovast seinasta kappingarár. Útidystirnir móti Mjølni og Drátti síggja á pappírinum út til at vera teir torførastu dystirnir, og báðir eru vunnir 3-0.

Leygardagin var TB vesturi í Vágum og spældi móti Drátti. Tær vunnu fyrsta sett so trygt sum 25-11, og tað næsta vunnu tær 25-13. Triðja sett var eitt sindur javnari, men endaði 25-23 til TB, sum sostatt vann dystin.

### Góðar móttøkur

Størsti munurin á liðunum leygardagin var ivaleyst í móttøkunum. Her vóru TB-kvinnurnar og serliga Maja Popovich nógv stinnari, og av tí sama lá eisini betur fyri hjá teimum at fáa gongd á álopsspælið. Og tað lá enntá so væl fyri, at rumenska Lili Popescu sat á beinkinum ein stóran part av øðrum setti og alt triðja sett.

Hjá Drátti gekk einki serligt. Sum vit fyrr hava nevnt, hava tær mist fleiri av leikarunum, sum áttu stóran part í meistaraheitinum, sum varð vunnið í vár. Serliga man saknurin í teimum báðum landsliðsleikarunum Helgu Nordendal og Gerdu Nattestad vera stórur. Hevarin Torgunn Jónsdóttir var við aftur leygardagin, men hon hevur einki vant og er tí langt frá vanliga forminum.

Fyri TB sær tað sera ljóst út, og hjá teimum ræður mest um at halda høvdið kalt og ikki hugsa ov langt fram í tíðina. Tær hava frí næsta vikuskifti, men um tvær vikur kemur Fleyr suður. Hetta verður fyrsti heimadystur hjá TB-kvinnunum í hesi kappingini, og tær kunnu ivaleyst rokna við dyggari áskoðaraundirtøku til tann dystin, nú tær hava fingið so góða byrjan uppá kappingina.

# Ruddiligur sigur til ÍF

**Flogbóltur: Fleyr byrjaði betur, men tað gekk skjótt hjá ÍF at seta seg á dystin og vinna 3-0**

**ÍF-Fleyr 3-0 (25-13, 25-18, 25-20)**

*Emil Lisberg Jacobsen*

Á Kambsdali vunnu kvinnurnar hjá ÍF 3-0 móti Fleyr. Tað var annars Fleyr, sum legði harðast út og kom á odda 7-1, men so vendi, og eftir tað gekk tað bara tann eina vegin. Settúrslitini vóru 25-13, 25-18 og 25-20, men hóast okkurt av settunum var nokkso javnt í stigum, so hevði heimaliðið allatíðina tamarhald á støðuni, og við sigrinum hava tær lagt seg á næstovast á stigatalvuni.

Komandi vikuskifti spæla Mjølnir og ÍF í Klaksvík, og í Havn hittast Fleyr og Dráttur.

# Fram lagt seg á odda



*Í einum tøttum og sera spennandi dysti eydnaðist tað teimum úr Fram at vinna 3-1 á SÍ*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Sørvingar snávaðu í Eysturskúlanum móti Fram, sum nú hevur lagt seg einsamalt á odda í meistaradeildini hjá monnum. Fleyr spældi sín fyrsta dyst í kappingini og vann 3-0 móti ÍF. Samanumtikið sær út til, at kappingin hjá monnunum verður meira spennandi, enn nógv høvdu roknað við**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

**Fram-SÍ 3-1 (19-25, 25-23, 25-20, 25-21)**
**ÍF-Fleyr 0-3 (12-25, 22-25, 22-25)**

SÍ hevur víst styrki seinastu vikurnar, og teir høvdu eisini gott mót til toppdystin móti Fram leygardagin. Sørvingar byrjaðu kappingina við at vinna sera sannførandi móti einum illa mannaðum ÍF-liði, meðan Fram við neyð og deyð hevði bast Mjølni 3-2 í Klaksvík.

Hetta umframt tað, at SÍ vann móti júst Fram í finaluni í Fleyr-kappingini fyri tveimum vikum síðani gjørdi, at nógv høvdu SÍ sum favoritt í Eysturskúlanum leygardagin.

Men tað gongur jú ikki altíð so sum prestur prædikar. Í einum tøttum og sera spennandi dysti eydnaðist tað teimum úr Fram at vinna 3-1 og soleiðis leggja seg einsamallar á odda í meistaradeildini eftir tvey tey fyrstu umførini.

Tað var SÍ, sum legði best út og vann fyrsta settið 25-19. Men so fekk Fram so líðandi betri tak á. Teir hildu uppat við at gera tær villurnar, teir høvdu gjørt í fyrsta setti, og gjørdi ikki mætari enn at vinna trý tey næstu settini. Men tað vóru trý sera tøtt sett. Fram vann tey 25-23, 25-20 og 25-21.

Og tað var eisini talan um tvey sera jøvn lið. Hesaferð drógu Fram longra stráið, tí teir høvdu ein betri dag. Meðan SÍ vísti javnt gott spæl allan vegin, mentist spælið hjá Fram gjøgnum dystin, og tað var tað, sum í síðsta enda førdi til sigurin.

Og spælið hjá havnarmonnunum var nógv frægari enn í Klaksvík eina viku frammanundan, tá teir ikki fingu vent dystinum fyrr enn í evstu løtu.

### Fleyr byrjaði við sigri

Útfallið av dystinum í Havn er eisini áhugavert fyri kappingina, tí við úrslitunum og spælinum hjá SÍ higartil hava summi stúrt fyri, at teir fóru at verða ov sterkir fyri øll hini, og at kappingin tí ikki fór at verða serliga spennandi. Men tað er neyvan ov langt av leið at siga, at sum tað sær út nú, hava trý lið nærum eins góðar møguleikar fyri at vinna kappingina. Fleyr vann á Kambsdali og kann ivaleyst eisini geva bæði Fram og SÍ harða kapping.

Fleyr vann 3-0 (25-12, 25-22 og 25-22), og komandi leygardag spæla teir á heimvølli móti SÍ. Tann dysturin fer helst eisini at geva eina góða ábending um, hvussu liðini bæði flóta. Hin dysturin í meistaradeildini næsta vikuskifti er í Klaksvík millum Mjølnir og ÍF. Hvørgin av teimum hevur fingið stig enn, og taparin av tí dystinum stendur einsamallur eftir á botninum. Fram hevur frívikuskifti næstu ferð. Teirra næsti dystur verður um tvær vikur móti Fleyr.



# Altjóða luttøkan hjá Molde er hótt

**Eftir stórtap á heimavølli eru líkindi fyri, at Molde í síðsta umfarinum kann missa fjórða plássið, sum ber europeiskan fótbólt við sær**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Tað gekst ikki væl hjá Molde sunnukvøldið. Brann úr Bergen vitjaði, og gestirnir fóru avstað aftur við øllum stigunum. 6.397 áskoðarar sóu teir vinna 3–0. Molde hevði kanska bóltin næstan so nógv sum mótstøðumenninir, og fyrstu løtuna høvdu teir tveir stórar málmøguleikar. Men spælararnir gjørdu eina røð av persónligum mistøkum, og tey vórðu sektaði.

Brann var frammanfyri 2–0, tá fyrra umfarið var hálvrunnið. Álopsmaðurin Torstein Helstad skoraði í 14. og aftur í 20. minutti. Fyrra málið var skot úr 20 metrum og dygst úti við stólparótina, og í seinna førinum tók hann bóltin frá einum verjuspælara og sneiddi framvið Jákupi Mikkelsen, áðrenn hann trillaði bóltin í tóma málið.

Tveir minuttir undan leikloki staðfesti Petter Furuseth Olsen trivaliga sigurin. Hann fór framvið allari verjuni, áðrenn hann skoraði.

Sambært norskum fjølmiðlum var Jákup Mikkelsen besti maður á Molde liðnum. Saman við liðformanninum Daniel Berg Hestad á miðvøllinum fær hann í dagblaðnum VG eitt seks tal. Bara tvey máls skjúttin hjá Brann fær meiri. Hansara avrik varð mett til eitt átta tal.

### Trýst á sær

Tað var ikki heilt óvæntað, at Brann skuldi vinna á útivølli ímóti Molde. Tað hava teir gjørt hvørja ferð, teir hava spælt landskappingardyst á nýggja stadion í Molde. Torstein Helstad skoraði eisini tvey mál í hesum dystinum í fjør.

Nú er bara eitt umfar eftir í norsku tippuliguni. Molde er framvegis á fjórða plássinum, sum ber UEFA Cup pláss við sær, men tað er ikki frítt, at teir eru kroystir. Stabæk er eftir púra óvæntaðan 1–0 útisigur á Rosenborg bara eitt stig aftanfyri, og við sigrinum á Molde er Brann bara tvey stig frá fjórða plássinum.

Í síðsta umfarinum tykist Stabæk hava léttasta dystin av teimum trimum. Teir skulu spæla á heimavølli ímóti Moss, sum ikki hevur nakað at stríðast fyri. Molde skal spæla á útivølli ímóti Viking úr Stavanger, sum hevur vunnið bronsumerkini. Brann fær í Bergen vitjan av Rosenborg.



*Jákup Mikkelsen og teir í Molde taptu greitt í næst seinasta umfarinum í Noreg, og nú er neyðgut við sigri í seinasta umfarinum, um Europeiskur fótbóltur skal tryggjast til komandi kappingarárið*

### Nýggjur spenningur

Tað varð annars lagt upp til, at meistaraskapurin longu leygardagin skuldi avgerast. Rosenborg er upptikið av Europa Cup, og tí var dysturin hjá teimum ímóti Stabæk á skránni leygardagin. Í norska fótbóltssambandinum roknaðu teir – sum øll onnur – við, at Rosenborg fór at vinna, og tí vóru teir á staðnum við steypinum og gullkrónunum, sum teir í Noreg handa beinanvegin, tá tað er greitt, at eitt lið er meistari. Men umboðsmenninir noyddust til hús aftur við skreytinum, og nú er spenningur um, hvør fer at vinna NM.

Lilleström vann 2–0 á útivølli ímóti Moss, og teir hava møguleikan. Í síðsta umfarinum skal Lilleström spæla á heimavølli ímóti Tromsö. Um Lilleström skal vinna NM, so skal Brann, sum sunnudagin í Bergen fær vitjan av Rosenborg, hjálpa teimum.

Sogndal er uttanfyri vandan fyri niðurflyting. Sunnudagin megnaðu teir 2–2 á útivølli ímóti Strømgodset. Kurt Mørkøre var ikki á vøllinum.

# Superligan líkist sær sjálvari

**Somu liðini vinna hvørja ferð, og í botninum gongst illa at fáa stig hjá Vejle og Silkeborg, sum í gjár skifti venjaran út**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

Hóast tríggir føroyskir spælarar hava sáttmála við feløg í superliguni, so spældi eingin í hesum umfarinum. Christian Høgni Jacobsen royndi seg fyrstu ferð næstsíðsta sunnudag. Men, sum vit søgdu í leygardagsblaðnum, so var hann hesu ferð á næstbesta Esbjerg liðnum.

Tað er einki stuttligt at spæla á seriuliðnum hjá Esbjerg. Teir eru í bólki við nógvum liðum á Sælandi, so talan er um nógva ferðing. Hesa ferð vóru teir í Ballerup, og Christian Høgni tykist miðvíst at arbeiða við at sannføra venjaran um, at hann eigur at vera á besta liðnum. Esbjerg tapti 3–2 íBallerup, og Christian Høgni skoraði fyrra málið.

Besta liðið hjá Esbjerg hevur í átta teimum seinastu dystunum fingið 21 stig. Hesa ferð vóru teir í Viborg, har teir vunnu 1–0. Tríggjar minuttir undan steðginum skoraði Michael Hansen einasta málið. Talan var ikki um nakað fótbóltsupplivilsi, men tað leggja teir í Esbjerg ivaleyst vertin á.

### Nógv ferðsla í FCK álopinum

Todi Jónsson bíðar framvegis. Skaðin heldur honum uttanfyri FCK álopið, har tað er nógv ferðsla, bæði so og so. Í síðstu viku hoyrdist, at Peter Møller hevði skrivað sáttmála við FCK. Í heimadystinum ímóti Lyngby varð hann settur á vøllin, tá tað restaði eitt korter. Viðhaldsfólkini hjá FCK hava ikki verið serliga fegin um henda handilin, og tað vóru nógv argandi bríksl at hoyra sunnudagin.

Ein annar FCK álopsspælari, 21 ára gamli Thomas Kjærbye, hevur givið skarvin yvir. Hann sær ongar møguleikar fyri, at hann skal fáa møguleikan á besta liðnum, og tí hevur hann skrivað sáttmála við AGF, har hann skuldi spæla fyrsta dystin longu í gjárkvøldið.

Á vøllinum gekk tað væl hjá FCK álopinum sunnudagin. At Lyngby er í stórari kreppu sæst alt betur á spælarunum og avrikunum. FCK vann 4–1 í Parkini, og tað sóu 8.812 áskoðarar. Miðvallarin Christian Poulsen skoraði tvær ferðir, og Zuma og Morten Bisgaard skoraðu eitt í part.

### Brøndby framvegis fremst

Brøndby spælararnir vóru í Ikast, har veteranmálverjin hjá teimum, Mogens Krogh, spældi nógvu síni fyrstu fótbóltsár. Vónbrotið frá Europa Cup dystinum í Kroatia tóktist ikki darva. FCM megnaði ikki at gera nakað, og Brøndby vann 3–1.

AB hevur síðani teir mistu fleiri landsliðsspælarar, og síðani tað varð alment, at felagið er illa fyri fíggjarliga, vunnið nógvar dystir. Sunnudagin á Gladsaxe stadion smurdu teir Vejle av 4–0. Christian Lundberg, sum er annar av toppskjúttunum í superliguni við átta málum, skoraði tvær ferðir.

AaB er næstfremst, men teir skuldu ikki spæla fyrrenn í gjárkvøldið, tá AGF skuldi vitja í Aalborg.

### Venjarin farin

Umframt AGF og Vejle er Silkeborg heilt illa fyri í botninum. Teir hava bara fingið trý stig higartil, og í gjár gekk tað, sum tað ofta ger hjá botnliðum. Eftir at Silkeborg í fyrradagin hevði tapt 2–1 í Odense ímóti OB, so varð venjarin, Benny Johansen, loystur úr starvinum í gjár. Morten Bruun, sum í mong ár var ein av stuðulsspælarunum, hevur nú ábyrgdina av liðnum. Hann er útlærdur tíðindamaður og hevur ta seinastu tíðina verið viðmerkjari í fótbóltssendingunum á TV Danmark rásini.

Kasper Dalgas, sum í summar flutti frá Vejle og til OB, skoraði bæði OB málini sunnudagin. Hann er annar av toppskjúttunum í superliguni. Einki er at ivast í, at teir í Vejle væl kundu hugsað sær at havt hann á liðnum.